# Formansfrágreiðing 2010

Væl komin á fund hin 3. Februar.

Fyrst vil eg nýta høvið til at bjóða tveimum nýggjum feløgum vælkomnum í LISA. Hesi eru Einleikarafelag Føroya og Myndlistasambandið.

**Inngangur**

Nú er so aftur eitt listarligt og mentanarpolitiskt ár farið aftur um bak, og vit kunnu við afturvendandi sorg siga, at á mentanarpolitiska økinum er ikki hent tað stóra og við gleði siga, at hóast fortreytir og treytir ikki eru til staðar, so hava vit eitt ríkt og í nógvum førum eitt dygdargott listalív í Føroyum.

**Depil til kreativar vinnur**

Seinastu árini, hevur verið tosað nógv um hetta hugtakið, ið verður kallað kreativar vinnur. Hugtakið er komið umvegis umskipanina av bygnaðinum í norðurlendskum stuðulskipanum og harvið eisini norðurlendskum mentanarpolitikki. Tað er jú soleiðis, at politikarar kring norðurlond, royna av øllum alvi at tekkjast reyða teppinum. Teir hava funnið fram til, at tað er ein ávísur marknaður í list, sum fjøldini dámar. Tað hevur stóran týdning fyri teir, at hesi fáa stuðul, soleiðis, at fjøldin eisini stuðlar teimum. Harvið missir tann meir ágangseggjandi og nýskapandi listin, har skapanartilgongdin hevur minst líka nógv at siga sum sjálvt tað framleidda hevur. Kreativar vinnur hava tað við sær, at tær eggja til hópframleiðslu og tí liggur originaliteturin ikki í tí einkulta verkinum, men í tí hópframleidda brúkslutinum

Vinnumálaráðið hevur nú eisini orðað ein slíkan politikk fyri kreativar vinnur og eg má siga, at hetta upprit, sum frá teimum er komið, er so mikið vánaligt og illa

úr hondum greitt, at tað er flóvisligt, at tað liggur alment frammi. Vit hava gjørt viðmerkingar til uppskotið, sum vit meta er skeivt úr einum enda í annan. Tað hevur sjálvandi týdning, at vit gera ein kreativan depil í Føroyum, men vit meta eisini, at tað hevur stóran týdning, at Vinnumálaráðið samstarvar við Mentamálaráðið, Uttanríkismálaráðið og við tey ymisku listaøkini um hetta. Tað hevur stóran týdning, at hin skapandi listin verður tikin við, tí at tað er hon, sum peikar frameftir. Handverkslist hevur ofta samband við fornfrøðina. Vit eiga at kunna vísa á, at vit hava eina ávísan arv, sum er serstakur fyri Føroyar og vit eiga eisini at kunna vísa á, at okkara list byggir á eitt søguligt tilvit, har vit skapa nýggja list.

**Skandinaviska húsið í Rom**

Í november mánaði fingu vit eina áheitan frá stýrinum fyri Skandinaviska húsið í Rom, um, at teir manglaðu einar 120.000 kr. til framhaldandi at hava húsið opið fyri norðurlendskum listafólkum. Talan var um, at hvør stjórn í norðurlondum stuðlaði húsinum við 15.000 kr hvør. Hetta vildu londini ikki, og tí varð avrátt, at hvørt limafelag ið teimum ymisku listafólkasambondunum í norðurlondum skuldu stuðla við einari upphædd, ið svaraði til støddina á listafeløgunum. Vit sendu eitt skriv niðan til MMR, har vit spurdu, um tey kundu stuðla Skandinaviska húsinum í Rom vegna listafeløgini í Føroyum. Teir hava goldið 20.000 kr. , og nú er støðan hon, at Landsstýrið er einasta stjórn í norðurlondum, sum hevur goldið. Hetta hevur verið við til at bjarga rakstrinum í Skandinaviska húsinum í Rom í hálvt annað ár fram. Stýrið er nú farin í holtur við at yvirtala hinar stjórnirnar. Tá ið lítla Føroyar kunnu gjalda, og vísa ein politiskan vilja til at húsið framhaldandi eigur at verða ein partur av norðurlendskum samstarvi, so eiga hini londini eisini at kunna gjalda. Skandinaviska húsið hevur alstóran týdning fyri norðurlendskt samstarv. Hóast húsið liggur í Rom, so meta vit í teimum norðurlendsku listafólkasambondunum, at húsið hevur eina stóran søguligan og samtíðarligan týdning fyri samstarvið millum listafólk í norðurlondum. Hetta seinasta árið hava fýra føroyingar verið í Rom.

## Mentanargrunnur Landsins og Listaráð

Hetta málið er á skánni á hvørjum ári. Meiningin var, at Mentanargrunnur Landsins skuldi umskipast til eitt Listaráð, soleiðis, sum varð greitt frá í formansfrágreiðingini í fjør. Tá ið talan er um at fáast við politiska skipan, so verða vit noydd at brynja okkum út við tí, sum nærkast Jobs toli. Fyrst var meiningin, at uppskotið um Listaráð skuldi leggjast fyri Tingið í fjør heyst, men so varð ikki. Sum vanligt, kom okkurt annað í vegin. Eg má ærliga siga, at eg veit ikki, nær uppskotið um at broyta Mentanargrunn landsins til Listaráð kemur fyri Tingið. Tá ið vit spyrja tey, ið arbeiða við tí, so leggja tey høvdið á sneið og yppa øksl, og tað merkir, at eru vit heldig, so verður tað í ár – annars okkurt annað ár. Men vit streingja framvegis á.

Í mars mánaði í fjør fingu vit klagu frá Kristiani Blak, har ein umsókn til konsertferð uttanlands, varð avvíst við grundgevingini: at Mentanargrunnurin ikki stuðlaði konsertferðum uttanlands. Vit settu okkum í samband við Joannu Djurhuus, og hon svaraði at hetta var ein óheppin orðing. Talan var ikki um at nokta stuðul til konsertferðir uttanlands.

## Norðurlendskt samstarv

Í september varð norðurlendsk "kulturforum" hildið í Norðurlandahúsinum. Sum so mangan fyrr á slíkum forumum, so valdaði reinur ruðulleiki. Nógv nýggj fólk møttu, sum ongantíð áður høvdu verið við til slíkt forum, og tí skuldu tey fáa alt at vita av nýggjum. Eisini hendir tað, tá ið fólk, ið hava politisk áhugamál og listalig áhugamál koma saman, at tey ikki skilja hvørt annað. Hetta fingu vit peika á, og Jenny, sum varð skrivari í tí eina bólkinum, sendi eina drúgva frágreiðing til politikararnar og embætisfólkini, ið vóru við.

## Mentanarting í Føroyum í 2011

Vit royna at savna inn peningastuðul til at hava eitt Mentanarting í Føroyum í 2011, har høvuðsevnini eru útnorðurlondini og hvussu list verður fjølmiðlað. Tað sær eitt sindur svart út júst nú, tí at ringt er at savna pengarnar, men vit fara at søkja teir grunnar, sum eru til, og so fáa vit at síggja, hvussu leikur fer fram.

**Nýggj limafeløg**

Í oktober fingu vit áheitan frá Einleikarafelagnum og Myndlistasambandinum, um at gerast limir í LISA. Kallað varð inn til umboðsráðsfund, har atkvøtt varð um hesi bæði feløgini skuldu gerast limir í LISA. Ikki varð uppmøtingin av tí stóra, sum vanligt er, og tey, ið møttu atkvøddu fyri, at Einleikarafelagið og Myndlistasambandið vórðu nýggir limir. Fyri Einleikarafelagið eru komnir Ólavur Jacobsen og Ragnar Olsen í umboðsráðið og fyri Myndlistasambandið eru komnir Bárður Jákupsson og Tróndur Patursson. Nú eru 11 limafeløg í LISA.

**ALS-skipanin**

Í juni høvdu vit almennan fund um nýggju ALS-skipanina. Ernst Jacobsen og eitt starvsfólk úr ALS vóru í Landsbókasavninum og greiddu frá umm nýggju skipanina. Ikki nógvir fyrimunir eru í nýggju ALS-skipanini, men Jenny sendi honum eitt upprit, har vit mæla til, at tey listafólk, ið eru arbeiðsleys kunnu skipa seg soleiðis, at tey gera okkurt listarligt saman, fyri síðani at fara at vísa úrslitið fyri almenninginum. Hetta hevði verið ynskiligt at fingið ígjøgnum, soleiðis at listafakið fekk ta virðing, sum tað hevur uppiborið. Tíverri møttu alt ov fá listafólk til henda fundin.

**Estisk vitjan**

Í apríl vóru tveir embætismenn úr estiska mentamálaráðnum og vitjaðu í Føroyum. Teir høvdu verið á rundferð í norðurlondum, har teir høvdu fundast við

avvarðandi myndugleikar á mentanarøkinum og listafólk. Teir høvdu nógv góð hugskot, sum embætisverkið í Føroyum kundi lært av, men vit kundu ikki læra teir tað stóra. Syrgiligt er, at eitt land, sum Estland hevur betri politikk á mentanarøkinum, enn vit hava. Serliga tá ið vit hugsa um, at talan er um eitt ógvuliga fátækt land, har arbeiðsloysið er á 15 prosentum. Tá ið politikarar virða listafólkini, so kemur alt annað av sær sjálvum.

## Upphavsrætturin er yvirtikin

1. januar í ár, varð upphavsrætturin føroyskt málsøki. Sum vanligt, so er hetta ikki serliga væl gjøgnumhugsað. Økið er yvirtikið, og nú siga myndugleikarnir, at teir fara til verka. Nógvir prinsipiellir og týðandi spurningar eru, sum skulu svarast, áðrenn nakað kann setast í verk. Vit hava árið at handla rætt í. Serliga er spurningurin um, hvør skal umsita eitt slíkt ovurstórt apparat sum tað er at umsita upphavsrættin. Vit mæla frá, at umsitingin liggur í Føroyum. Vit hava gjørt vart við, at tann eina milliónin, ið MMR hevur sett av til at umsita økið, er langt, langt frá nóg mikið. Fyri at koma við einum dømi um, hvussu kostnaðarmikið tað er at umsita upphavsrættin, so brúkar KODA 50 milliónir árliga til sakførarar, ið arbeiða við at verja upphavsrættin hjá tónaskølum og tekstahøvundum. Hvussu í verðini ætla føroyskir myndugleikar at umsita allan upphavsrættin við einari skallutari millión? Ein bólkur skal setast, ið skal koma við einum áliti um, hvussu upphavsrætturin skal umsitast. Vit hava melda okkum til og bíða bara eftir fundarboðum.

## Mentanarvirðisløn landsins og Heiðursgáva landsins 2009

Í ár vórðu aftur latnar Mentanarvirðisløn landsins og Heiðursgáva landsins. Í ár fekk Laura Joensen Heiðursgávu landsins á 75.000 kr fyri sítt stóra arbeiði fyri føroyskan sjónleik og Kári P fekk Mentanarvirðisløn landsins á 150.000 kr fyri sínar sangir og tekstir. Í nevndini, ið velur hesi eru: Oddfríður Marni Rasmussen, Astri Luihn, Martin Næs, Páll Danielsen og Alda Joensen er skrivari.

**Gávugóðsið úr grunni Thorvald Poulsens av Steinum**

Kjartan Hansen fekk gávugóðsið úr grunninum á 60.000 kr. í fjør. Í hesi nevnd eru føddu limirnir: formaðurin í LISA, rektarin á Fróðskaparsetri Føroya og formaðurin í Føroya lærarafelag. Gávugóðsið verður latið á hvørjum ári á føðingardegi Thorvalds – hin 8. februar. Í ár verður gávugóðsið handað á Fróðskaparsetrinum mánadagin hin 8. februar.

**Lógarbroyting í LISA**

Vit hava leingi tosa um, at vit gjarna vilja hava umboðsráðið minkað, soleiðis, at hvørt felag velur ein lim í umboðsráðið. Hetta kemst av tí, at ringt er at manna umboðsráðið, og tá ið vit kalla inn til fundar, er uppmøtingin ógvuliga vánalig, fyri ikki at siga ongin. Her má okkurt gerast. Við at fækka umboðsmannatalið meta vit, at umboðsráðslimirnir taka sítt starv í størri álvara og møta til fundirnar. Eisini verður lættari at fáa fólk, ið veruliga VILJA sita í umboðsráðnum, um bara ein limur er.

**Samstarv við limafeløg**

Ymiskt er, hvussu gott samstarvið er við limafeløgini og hvussu nógv limafeløgini brúka LISA. Summi feløg brúka LISA nógv, meðan onnur hoyra vit ikki frá. Tað er ynskiligt, at vit kunnu samstarva betur, at feløgini brúka LISA meir. Vit hava ein skrivara, sum kann hjálpa til við ymiskum, tað verið seg umsóknum, fyrispurningar um sosial- ella skattaviðurskifti. Tað koma ikki so grúiliga nógv mál inn frá feløgunum. Um tað er tí, at tey ongar trupulleikar hava, at alt er so gott, íðan so er alt í fínasta lagi, men er hava tey okkurt, sum tey ein trupulleika, ið tey ikki sjálvi hava yvirskot til at loysa, so eru vit her til tað sama. Tað er jú tað, tit gjalda limagjaldið til.

## Keypið-føroyska-list dagur

Hin 18. desember heittu vit á føroyingar um at fara at keypa føroyska list. Grundgevingin var, at tey ikki skuldu keypa føroyska list fyri at stuðla listafólkunum, men fyri at stuðla føroyska búskapinum. Vit gjørdu so, fyri at vísa á, at listafólk eisini eiga ein part av teimum inntøkum, sum landið fær. Hetta ætla vit at gera sum ein afturvendandi tátt.

## Mentanarpolitisku vánirar fyri árið 2010

Í Sosialinum varð eg spurdur, hvussu eg metti, at árið í ár fór at týggja sær á mentanar- og listaøkinum. Har valdi eg at verða bjartskygdur, hetta fyri líkasum at broyta stratigi. Tað er lættast at sita og grenja og mjarra, tí at vit hava nóg mikið at grenja og mjarra um. Tað er vist. Men hetta hjálpir sjáldan. Tí valdi eg at vóna, at politikarar, serliga mentamálaráðharrin, taka seg saman og gera okkurt við korini hjá okkum, sum starvast við at skapa list. Um vit blíva við at streingja á politisku myndugleikarnar um at arbeiða fyri okkum, so fer einaferð at bragda. Tað sigst, at tað er fíggjarkreppa í landinum, og tí hevur tað alstóran týdning, at vit eru meira áhaldandi og tvør, enn fyrr. Hvørt oyra verður vent. Tí hevur tað stóran týdning, at vit kunnu brúka støðuna rætt. Vit mugu fáa Mentanargrunn landsins umskipaðan til eitt Listaráð í ár. Argumentið er, at MMR sparir kreftir í umsitingini, tí at ein partur av arbeiðinum, sum fulltrúar gera, verður fluttur yvir í Listaráðið at umsita. At umskipa MGL til Listaráðið krevur eina játtan á 500.000 kr til umsiting, og tað er ikki tað stóra.

Eg havi tosað við ymiskar politikarar bæði í samgonguni og í andstøðuni um, hvussu játtanin til MGL kann hækkast. Tað er soleiðis, at umleið helvtin av játtanini í MGL fer til starvsløn. Fara 2,6 milliónir til starvsløn, so gjalda hesi okkurt um 1,3 í skatti. Um MGL varð hækkaður við hesi upphædd árliga í eini sjey ár fram, so byrjar at líkjast. Við hesum gerst hækkingin eitt slag av sjálvfigging. Sjálvandi er ein partur av hesum kommunuskattur, men eg ivist ikki í, at størsta

kommunan í landinum vil vera við í hesum. Mentamálaráðharrin helt hetta hugskotið vera áhugavert og skuldi viðgera tað í MMR. Vit mugu sjálvandi skunda undir. Hetta hevur sjálvandi bara verið munnligt prát. Vit fara at senda teimum eitt skriv, har vit mæla til, at hesin leisturin verður brúktur.

Í fjør kannaðu normenn fíggjarligu korini hjá listafólkum. Henda kanning vísir, at listafólk hava ógvuliga trong kor at liva undir. Høvuðsinntøkan hjá listafólkum í Norra er makin. Í Føroyum er støðan helst nógvar ferðir verri. Vit kundu hugsað okkum at gjørt eina slíka kanning, fyri at staðfesta, hvussu neyðarslig livikorini eru hjá listafólkum í Føroyum. Hetta kunnu vit brúka til at yvirtala politikararnar, at her er ein samfelagsbólkur, sum livir undir hungursmarkinum.

Við vón um mentanarpolitiskan bata og gott samstarv

Oddfríður Marni Rasmussen